# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Oyggjaleikir 2015

ÍSF hevur stungið út í kortið, at Føroyar skulu hýsa oyggjaleikunum í 2015. Tann umsóknin varð send inn fyri tveimum árum síðani, og á Rhodos varð enn eitt fet tikið á leiðini. Hetta tá ÍSF-forsetin saman við løgmanni og mentamálaráðharranum var á fundi við altjóða Oyggjaleikanevndina.

Og ivaleyst var hetta eitt skilagott stig at taka. Við hesum hava landsins myndugleikar greitt fingið at vita, hvat krevst, skulu Føroyar aftur hýsa leikunum. Ítróttaliga hevur tað helst staðið teimum innan ÍSF greitt, hvat skal gerast, um málið skal røkkast. Men einsamallur hevur ítrótturin ongan sum helst møguelika at standa sum fyriskipari.

Tað krevur nevnliga, at alt tað føroyska samfelagið tekur stór tøk. Ikki bara innan 2015, men longu um tvey ár skulu vit púrasta greitt kunna vísa á, at Føroyar eru til reiðar. Og tá nyttar lítið at greiða frá, hvat vit ætla at gera komandi seks árini.

Tí er kravið nú, at ein púrasta greið politisk útmelding kemur sum skjótast. Vilja vit hýsa leikunum, so skal arbeiðið hesum viðvíkjandi ígongd her og nú. Og ikki minst má neyðugi peningurin játtast til endamálið. Vilja vit tað ikki, so er bara at siga tað, tí so nýtast hvørki ÍSF ella øðrum at nýta stórvegis orku ella pening til endamálið kortini.

Men tað vildi nú verið spell, um vit skulu spilla tann møguleikan, sum okkum stendur í boði. Ítróttar- og mentanarliga er talan um sanna stórhending, sum á mest sum øllum økjum kann vera við til at lyfta føroyska støðið. Og samfelagsliga er talan uttan iva eisini um stóran vinning. Talan er um íløgur – ikki útreiðslur – sum føroyska samfelagið fær afturgoldið fleirfalt, verða leikirnir hildnir. Og tí skal við hesum verða send ein innilig áheitan til landsins myndugleikar um at stuðla málinum, um visjón 2015, tá um oyggjaleikir ræður.

**Sosialurin**

## Rembingar um Sandoyar tunnilin

**GERHARD LOGNBERG**



Ja, nú eru øgiligar rembingar um Sandoyartunnilin. Tað síðsta var Reidar Nónfjall, sum visti akkurát, hvat var best at gera. Jú merkiligt er, Reidar skrivar nøkur negativ orð um Sandoyartunnilin, jú so skuldi hesin stjóranna stjóri hivast í sjónvarpsstovina at spæla síni, so altíð negativu ábreiðslur út, heldur enn at tosa sítt sum hann skuldi havt nokk við. Nei Reidar, tað er tær líkamikið, um Sandoyggin fær ein tunnil ella Suðuroyggin fær betur samband, tí tú er væl bjargaður á fastlandi, stjóra størvini flúgva um oyrini á tær.

Tað, sum eg bleiv eina mest ørkymlaður av, var, tá mín góði vinur Torbjørn Jacobsen úttalaði seg negativt um Sandoyar tunnilin, tí eg meinti at Torbjørn var verja hjá útjaðaranum og ikki minst Sandoy og Suðuroy.

Uppskotini til frama fyri útjaðaran hava flogið um oyruni á okkum. Tildømis Svínoy sum hevur hart tiltrongt samband, har var Torbjørn við uppskoti. Ein Svínoyingur skrivaði sum, at nú var bara ein bjarging fyri teimum og tað var Torbjørn. Tað var mangur maður og kvina sum høvdu tár í eygunum og søgdu, nei eingin er sum Torbjørn. Hann er harmæltur, men hjarta er á rætta stað vælsignaður.

Men Torbjørn meinti einki við uppskotini, hann hevur lagt fyri tingið um tunlar og annað gott útjaðaranum til frama, hann má hava gníggja sær í lógvan so hvørt tey fullu.

Hvat sigur Sjúrður Skaale, jú hann rósar Magna Laksafoss fyri mans mót, tí hann vil leggja bein fyri Sandoy og sostatt bløgga hana endaligt.

Men hvat segði hesin, jú hetta er meginparturin búskaparfrøðingar. Sambandsflokkurin hevði ikki brúk fyri stemmum úr Sandoynni, slíkt tvætl skal man hoyra, nei feilurin er nokk tann at hesir menn traðka asfalti á meginlandinum.

Annars var vinskapur ímillum Tórshavn og Skopun. Minnist at abbi mín Sommer fekk flaggstong og flagg til gávis frá Sigfred Skaale, tá hann fylti 60 ár, men teir eru báðir farnir foldum frá. Tað vóru abbarnir hjá okkum Sjúrður, so vítt eg veit.

Men Sjúrður, tíni úttalilsir vóru bara skemtilig, so eg veit at tú meinti ikki eitt orð av hasum tvætlinum, sum tú førdi framm í útvarpinum.

Jú mín sann um ikki Heðin D. Poulsen skrivar grein, við heitinum Gerhard Lognberg bluffar. Hann spyr hví eg ikki havi slitið samgonguna, hann er eisini onkurslags frøðingur ella kann eitt ella annað.

Um Heðin heldur at samgongan skrædnar, um Gerhard fer út so fer hann skeivur. So frætt má ein frøðingur kunna rokna út! Tín kærleiki til Sandoynna minnist eg frá teirri tíðini, tú var inni fyri Óla Breckman, so tíni krokudillu tár kann eg gott vera fyri uttan.

Men alt hetta vísur bara tann ágang, tá nakað skal gerast í Sandoy ella Skúvoy. Tá reisast teir sum sita væl, við feitum lønum, heitt og fjált, krúpa úr sínum góða skríni og argumentera so eld-neistar fúka teimum um oyrini.

Eitt prógv fyri at vit mugu ikki gera Føroyar til eitt valdømi!

Men eina hjartans tøkk skulu tit fáa, sum so mannliga hava víst aftur at steðga Sandoyartunnlinum.

Úttalilsini frá Jóannes Eidesgaard, Annfinn Kalsberg, Johan Dal og fleiri, var sum balsam fyri okkara sál í Sandoynni. Og gleðist hvørt mannsbarn í Sandoyar sýslu, fyri at hesar kempur vildu stilla seg við okkara lið, jú samgongan fer at halda orð og atkvøða tunnilin ígjøgnum og ikki siga, at í ringum tíðum hava vit ikki ráð og í góðum tíðum hitar búskapurin.

Ein Bergur skrivaði, at tað var ikki rætt at gera tunnil tí rottur koma í Sandoynna, vit skulu ikki taka allar frá tykkum, tit kunnu hava nakrar eftir hinumegin, tað kann vera ein avtala.

Hvørt mansbarn gleðir seg til tunnilin, í allari sýsluni, og er tað lív ella deyð fyri hetta økið.

Annars gleðist eg til aftur at koma í tingi at kempa fyri land og fólk og pausunum at eta piparkeks og kremkeks saman við landsins kosnum monnum og kvinnum.

## *Summar*

*Sólfyltar løtur*
*sólin*
*hitar*
*smábarnaføtur*

*Summarslig ljóð*
*túnatos*
*steikios*
*flennandi fljóð*

*Angandi løtur*
*sóljan*
*litar*
*grasfullar fløtur*

*Seinkandi flóð*
*aldur*
*sandur*
*børnini móð*

*Fuglanna sangur*
*eggið*
*ungin*
*dagurin langur*

*Friðsæla stund*
*sólin*
*leggur*
*dagin í blund*

**Valdemar á Løgmansbø**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.